FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 7. oktobur 2021
J. nr.: 21/19473
Viðgjørt: AE

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-040/2021 frá Bill Justinussen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, um Funningsfjarðarvegin

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at brúka tær 4,75 mió. krónurnar, sum eru játtaðar til Funningsfjarðarvegin í ár?
2. Nær verður vegastrekkið breiðkað og til fulnar dagført sambært ætlanum landsstýrismansins?
3 Nær verður verklagslóg løgd fyri Løgtingið, sum neyvt ásetir kostnað og tíðarætlan fyri umrødda vegastrekki umframt eisini vegin gjøgnum bygdina í Funningsfirði?
4 Hvussu stórur er metti kostnaðurin av at til fulnar dagføra og breiðka umrødda vegastrekki, heruppií eisini vegin gjøgnum bygdina í Funningsfirði?
5 Nær verður alt arbeiðið boðið út í almennum útboði, so verulig ferð kemur á arbeiðið og tað kann gerast liðugt innan rímiliga tíð?

Svar:
Funningsfjarðarvegurin er 2,2 km langur. Tað er vegastrekkið Millum Fjarða og Funningsfjørð, til har sum íbindingin er til Funningsvegin.

Vegurin liggur rímiliga væl, men er smalur og ikki bygdur til ferðsluna í dag. Samlaða verkætlanin snýr seg um at gera vegin tvíbreytaðar við 1 metur vegøksl á hvørjari síðu, at avrætta og at asfaltera allan vegin, og gera gongubreyt ein part av vegnum.

Eingin serstøk játtan hevur verið á fíggjarlógini til Funningsfjarðarvegin í øllum førum í eini 20 ár, fyrr enn í 2019 og so aftur í ár. Í 2019 vóru 2,7 mió kr. brúktar til at breiðka Funningsfjarðarvegin, og eru 4,75 mió. kr. játtaðar til vegagerð í ár, sum eisini verður brúkt at breiðka vegin. Samanlagt verða eini 1,9 km breiðkaðar tá játtanin er brúkt. Tá er at kalla einki annað gjørt.

Tað er at fegnast um, at vinnulívið trívist í Funningsfirði. Um so er, at vegurin eisini verður breiðkaður og dagførdur til omankoyringina í havnalagið, og sostatt verður 2,43 km langur, metir Landsverk at verkætlanin við øllum fer at kostar eini 19-20 mió. kr. Sostatt skulu 11-12 mió. kr. játtast afturat til vegagerðina.

Vegagerðin verður boðin út so hvørt sum játtan er til endamálið. Tað er altíð best at gera eina verkætlan lidna uttan steðg. Um Løgtingið játtar neyðugan pening verður verklagslóg gjørd, og restin av verkætlanini boðin út til liðugtgerð.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Annars kann upplýsast, at sambært tí langtíðarløguætlanini sum fyriliggur verður peningur játtaður til Funningsfjarðavegin í 2026 – 2027 til at gera verkætlanina lidna.

Tinganes, 7. oktobur 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum